


# 9 kommunur í Føroyum

Í framtíðini skulu tað vera níggju kommunur í Føroyum. Hetta er tað, sum nú liggur í kortunum hjá samgonguni, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum.

Ein politiskur fylgibólkur hevur arbeitt við at nýskipa kommunubygnaðin og hann er samdur um, at frá 1. januar 2013, skulu Føroyar verða níggju kommunur.

Tað merkir, at tá ið val til kommunustýri verður aftur á heysti í 2012, verður bara valt til hesar somu níggju kommunurnar.

Tær níggju kommunurnar, sum Føroyar verða býttar sundur í, eru:

1: Norðoyar Kommuna, sum skal fevna um Fugloyar- Viðareiðis- Hvannasunds- Húsa- Kunoyar og Klaksvíkar Kommunu.
2: Eysturøkið, ið skal fevna um Eystur Kommunu og Fuglafjarðar Kommunu.
3: Skálafjarðar Kommuna, ið fevnir um Nes Kommunu, Runavíkar Kommunu og Sjóvar Kommunu.
4: Sundalagið, ið fevnir um Sunda Kommunu og Eiðis Kommunu.
5: Vesturøkið, ið fer at fevna um Vestmanna og Kvívík.
6: Vága Kommuna fer at fevna um Vága- og Sørvágs Kommunu.
7: Suðurstreymoyar kommuna verður óbroytt. Hetta er økið, sum nú eitur Tórshavnar Kommuna.
8: Sandoy og Skúvoy verða ein kommuna.
9: Suðuroy verður ein kommuna.

# Ongin skal tvingast

**FÓLKAATKVØÐA** Tað er ein samtykt í Fólkaflokkinum, at fólkaatkvøða skal verða í øllum kommunum um samanlegging, tí ongin skal tvingast

- Tað er eitt krav frá Fólkaflokkinum til samgonguna, at kommunur skulu ikki leggjast saman fyrrenn fólkaatkvøða hevur verið í øllum kommunum.

Tað staðfestir Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin.

Hann er eisini limur í politiska bólkinum, sum viðgerð spurningin um ein nýggjan kommunubygnað.

Hann hevur stóran áhuga í spurninginum um kommunubygnaðin og hann staðfestir, at hann fer aldrin at góðtaka, at kommunur verða tvingaðar at leggja saman.

Hann sigur, at tað er ein samtykt í Fólkaflokkinum, at ongar kommunusamanleggingar verða uttan at fólkaatkvøða hevur verið um tað fyrst.

Og hann leggur afturat, at fólksins vilji skal virðast, tí kommunur skulu ikki tvingast at leggja saman, har fólkið ikki vil.

Tað merkir, at í teimum kommunum, har fólkaatkvøðan vísir, at meiriluti er ímóti samanlegging, skal heldur ongin samanlegging verða.

### Kunnu verða uttanfyri

Fyri at nevna eitt dømi, so ætlar politiski fylgibólkurin, at Fuglafjørður og Eystur Kommuna skulu leggjast saman.

- Men verður úrslitið av eini fólkaatkvøðu í Fuglafirði, at fólkið sigur nei til samanlegging, skulu kommunurnar heldur ikki leggjast saman.

Eitt annað dømir er Suðuroy, sum eftir ætlan skal verða ein kommuna.

- Men siga vágbingar nei til fólkaatkvøðu, skal Vágur sleppa at standa uttanfyri eini samanlegging, staðfestir Jógvan á Lakjuni.

### Høvuðsmál óloyst

Hann ivast eisini í um samgongan er so øgiliga nær eini semju um kommunubygnaðin, sum Annika Olsen heldur á aðrari grein her á síðunum.

- Ein avgerandi spurningur í málinum um ein nýggjan kommunubygnað, er, hvussu tey fíggjarligu viðurskiftini skulu skipast og um talan skal vera um eina útjavningarskipan, eina blokkstuðulsskipan frá landi til kommunur, ella um eina heilt aðra skipan.

- Hetta er kanska tað tórførasta málið av øllum at finna semju um, men her er spónurin ikki settur í greytin enn, so enn er langt eftir á mál, sigur Jógvan á Lakjuni.

# Fólkaflokkurin slakar fyri at fáa semju

**MUGU SLAKA** Vit hava slaka og vil restin av samgonguni eisini slaka, kann semja fáast heilt skjótt, sigur Jørgen Niclasen

- Vilja Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin slaka, kann semja fáast um ein nýggjan kommunubygnað í allar nærmastu framtíð.

Tað sigur Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins.

Jørgen Niclasen sigur, at Fólkaflokkurin krevur ikki longur, at skúlamál skulu leggjast undir kommunurnar at verða umsitin.

- Í hesum máli hava vit slakað fyri at slóða fyri eini semju, sigur hann.

Men afturfyri vil Fólkaflokkurin hava, at fólkaatkvøða skal vera í teimum ymsu kommunum um samanlegging.

Hann vil ikki inn á smálutirnir í eini fólkaatkvøðu, men hann staðfestir, at skal ein kommunusamanlegging hepnast væl, er tað altavgerandi, at fólkið er við og tekur undir við henni.

- Vit mugu tryggja okkum, at fólkið er við til at taka støðu, tí tað er trygdin fyri, at samanleggingin fer at eydnast.

### Samdur innanfloks

Formaður Fólkafloksins leggur afturat, at vilja hinir samgonguflokkarnir ganga Fólkaflokkinum á møti í kravinum um eina fólkaatkvøðu, kann semja fáast um ein nýggjan kommunubygnað í næstu viku.

Tað er ongin loyna, at innanfloks í fólkaflokkinum hevur stór ósemja verið um kommunubygnaðin.

Men Jørgen Niclasen sigur, at nú er Fólkaflokkurin fult samdir um leistin og tekur undir við, at tað skulu verða níggju kommunur og at eldraøkið verður lagt undir kommunurnar.

Men afturfyri skulu hinir flokkarnir taka undir við, at fólkaatkvøða skal vera um samanlegging.